# FÓLKAFLOKKUR FASTUR Í BLOKE

**POLITIKKUR** – Spyrt tú meg, hvat Fólkaflokkurin er samdur um, síggi eg onga semju um nakað. Hann kann ikki semjast um fiskivinnureform, burðardygd, umhvørvismál, kommunalreform, skúlareform, stjórnarskipan, tjóðskaparmál, rættarfatan ella búskaparmál. Eg havi leingi verið ónøgdur við arbeiðslagið, men nú bar bara ikki til meira, sigur Poul Michelsen, sum fyri viku síðan meldaði seg úr flokkinum. Nú ætlar hann sær at virka fyri at finna teir meirilutar á tingi, sum vilja arbeiða fyri at gera lógir og karmar, ið svara til tey krøv og avbjóðingar, samfelagið hevur fyri neyðini. Reformar eru alneyðugir, heldur hann



Uni Arge

– Í dag er gingin ein vika, síðan eg fór úr flokkinum, og tað kennist væl at sleppa undan at høggast við nakað, sum er vónleyst. Fólkaflokkurin verður noyddur at lurta eftir teimum fólkum, sum hava funnist at honum. At Annfinn Kallsberg onki skilir, er væl rættiliga lýsandi fyri støðuna. Um flokkurin ikki hevur førleika at flyta seg inn í nútíðina og fremja tær broytingar, sum eru neyðugar, vænti eg, at flokkurin fær fleiri skelkir, tí fleiri hava somu støðu sum eg. Eg eri ikki einsamallur um hetta.

Hesa heilsan sendir Poul Michelsen sínum fyrrverandi floksfeløgum í Fólkaflokkinum, sum í farnu viku rættiliga kom í andglettin, tá tingmaðurin úr Havn eftir 40 ára tænastu sendi formanninum, Jørgeni Niclasen, partíkortið og takkaði fyri seg. Hann hevði fingið nóg mikið av, at Fólkaflokkurin ikki fylgdi stevnuskránni, og at minnilutar ferð eftir ferð steðga politiskum málum, ið kunnu flyta Føroyar inn í framtíðina, segði hann.

## Ongir reformar

Poul Michelsen setti ikki nágreiniliga orð á, hvat at enda fekk hann at fara, men tað ger hann nú. Hann hevur verið ónøgdur við støðuna leingi, tí ferð eftir ferð hava týdningarmikil mál verið blokerað í flokkinum. Eitt dømi var revsilógin, sum Annika Olsen, landsstýriskvinna, legði fyri tingið fyrr í ár, og sum mundi kostað henni hennara politiska lív í flokkinum.

Dropin, ið fekk bikarið at flóta yvir, var ein hending hósdagin fyri 10 døgum síðan, tá ein stórur meiriluti í Fólkaflokkinum var sinnaður at semjast við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin um ein kommunalreform, ein skúlareform og at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

– Vit vóru komin so langt, at ein massivur meiriluti var fyri hesum í flokkinum. Men ein lítil minniluti í flokkinum, Annfinn Kallsberg, Jógvan á Lakjuni og Jákup Mikkelsen, hótti restina av flokkinum við so stórum avleiðingum, at flokkurin bakkaði, sigur Poul Michelsen.

Tílíkar hendingar eru sambært Poul Michelsen ikki eindømi í Fólkaflokkinum. Í etiskum málum hevur hann upplivað, at serliga Jógvan á Lakjuni hevur hótt seg til, hvat onnur skuldu meina um etisk mál. Flokkurin, sum sigur seg tryggja tað persónliga frælsið, hevur á hendan hátt ikki virt egna stevnu, hóast etisk mál eru ein persónligur spurningur og ikki nakað floksmál.

– Flokkurin hevur givið eftir fyri hesum lítla minnilutanum av yvirberandi orsøkum, men hetta hevur undirgrivið so nógv tað, eg standi fyri, at tað gekk bara ikki meira. Ein einstakur maður kann ikki taka ein heilan flokk sum gíðsla. Um talan var um Miðflokkin, so var tað nakað annað, tí hann stendur sum flokkur saman um hasi sjónarmiðini í etiskum málum. Men Fólkaflokkurin stendur fyri persónligum frælsi, sigur Poul Michelsen.

## Ongin semja

Á skrivstovu síni á heilsøluni við Hoyvíksvegin í Havn ger fyrrverandi fólkafloksmaðurin upp, hvat Fólkaflokkurin er samdur við seg sjálvan um og tí eisini førur fyri at semjast við onnur um. Listin av málum, ið Poul Michelsen reksar upp, er langur, men í ongum av málunum dugir hann at síggja, at Fólkaflokkurin hevur felags stev.

– Sjúkan í flokkinum er, at fleiri ynskja radikalar broytingar, og at nakrir so halda ímóti. Spyrt tú meg, hvat Fólkaflokkurin er samdur um, so síggi eg onga semju um nakað. Hann kann ikki semjast um fiskivinnureform, ikki um burðardygd, ikki um umhvørvismál, ikki um kommunalreform, sum landsstýrisfólk hjá flokkinum hava slóðað fyri á dugnaligan hátt, ikki um skúlareformin, ikki um stjórnarskipanina, ikki um tjóðskaparmál og heldur ikki um búskaparmál. Eg dugdi bara ikki at síggja, at hetta var vert at vera partur av, sigur Poul Michelsen.

Hann leggur tó dent á, at hann vil ikki geva øðrum skyldina fyri, at hann er farin. Hann vil bara vísa á, at tað ber ikki til hjá Fólkaflokkinum at lata nakrar lítlar minnilutar standa á bremsuni í týðandi málum. Samfelagið má telgjast til tann veruleika, Føroyar eru í nú, og tað hjálpir ikki at knarra um blokkniðurskurðin fyri skjótt 10 árum síðan, sum summir eisini gera í Fólkaflokkinum, tí tann avgerðin er tikin og farin.

– Um vit ikki broyta samfelagið við reformum, so endar tað við, at tann almenni sektorurin koppar øllum samfelagnum. Politiska skipanin er nú løgst á vinnulívið við hækkaðum avgjøldum, men tað er so øgiliga avmarkað, hvussu leingi tú kanst gera tað, tí vinnan er viðbrekin. Hon kann ikki betala alt í allar ævir, og tann almenni parturin má skilja hetta. Vit mugu hava í huga, at tað er so at siga bara tann privati parturin av føroyska búskapinum, sum hevur tikið alt skrædlið, sigur Poul Michelsen.

## Ongin stýring

Hann fýlist eisini hvassliga á arbeiðslagið í Fólkaflokkinum. Jørgen Niclasen hevur sum persónur nógv góð evnir, heldur hann, men hann samansjóðar sum formaður ongan flokk. Tann uppgávan verður misrøkt, heldur Poul Michelsen.

– Vit fáa løn fyri at vera politikarar, men vit hava í ár ongan fund havt, har vit gjølla hava viðgjørt, hvussu okkara politikkur skal vera, og hvørjar okkara hugsjónir eru. Annfinn Kallsberg sigur, at hann hevur onki problem, og tað sigur kanska alt, tí um hann onki problem hevur, so hevur Fólkaflokkurin onki problem. Men problemið er stórt. So nógv lallarí er í flokkinum, at tað minnir um leti. Flokkurin verður ikki stýrdur, og tað hevur verið niðurgerandi at uppliva, sigur Poul Michelsen.

Hann nevnir stjórnarskipanarmálið sum dømi um eitt mál, ið flokkurin ongantíð so